Kommunufelagið

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
06. februar 2017

Okkara j.nr.
17/00456-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 17/00100

**Viðv. lógarbroyting í løgtingslóg um jarðhitaskipanir**

Fríggjadagin 27. januar 2017 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið sent felagnum “Uppskot til broyting í løgtingslóg um jarðhitaskipanir” til hoyringar. Hoyringsfreistin er sett til 2. februar 2017.

Kommunufelagið skal boða frá, at felagið ikki hevur viðmerkingar til sjálvt uppskotið.

**Hinvegin** vil felagið enn eina ferð gera vart við, at vit als ikki kunnu góðtaka slíka hoyrings-mannagongd.

Hoyringskrivið er sent felagnum **fríggjakvøld kl. 23.40** og hoyringsfreistin er **hósdag vikuna eftir.** Við øðrum orðum hevur felagið 3 yrkadagar at avgreiða hoyringina. Hoyringsskrivið skal upp á 3 dagar fáast út til kommunurnar, viðkomandi fakfólk í kommununum skulu lesa og viðmerkja uppskotini, sum tey so skulu senda felagnum aftur. Síðani skal felagið seta saman neyðuga hoyringsskrivið, ið eisini skal góðkennast politiskt.

Hetta letur seg snøgt sagt ikki gera teir 3 dagarnar, sum vit hava fingið til hesa uppgávu.

Hoyring og hoyringsmannagongdir eru ein týðandi tættur í okkara fólkaræði – men at senda uppskot til hoyringar, uttan at geva hoyringspørtunum veruligar møguleikar at svara, er meiningsleyst. Tá er hoyringin innantóm, bert eitt eiti, hvørs endamál er at síggja út sum fólkaræði.

Vit hava áður skotið upp, at hoyringsfreistirnar í minsta lagi eru 6 vikur. Hetta er ein hóskandi freist, skal hoyringin virka í verki.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**